# Teirra egna

**Tað spælir væl av, tá trý norðurlendsk mál finna saman á palli á gamla Meiarínum, í sterka leikinum, Macbeth**

UMMÆLI
*Heri á Rógvi*



*Hans Tórgarð og Katarina Nolsøe vísa, at føroyskt riggar væl til Shakespeare*

Tað er altíð hugaligt at fara til sjónleik á gamla Meiarínum. Serligu umstøðurnar har fjálgað um sjóneikin í Føroyum. Hóast hølini ikki eru millum tey størstu í sjónleikaheiminum, so er eitt ávíst heilt serligt huglag at finna har.

Soleiðis er tað eisini hesi kvøldini, tá Macbeth verður spælt – kanska meira enn nakrantíð. Ein samanrenning millum eina døkka pallmynd, einklir, men ikki lítið stórbærir búnar, góð sjónleikaraevni og ikki minst ein ógvulig forkunnug og spennandi nýtsla av ljóði.

Tað verður sagt um Shakespeare: »Not for any age, but for all time«, og hetta kanst tú væl knýta at heldur sermerktu sýningini, sum hesar dagarnar vitjar í Føroyum, áðrenn farið verður til onnur Norðanlond. Klassiski leikurin um Macbeth er latin í nýggjan ham, men talan er ikki um keisarans nýggju klæði. Leikurin megnar rættiliga væl at finna sína egnu »linju«, so at siga. Pallurin er ótrúliga einkul, soleiðis at alt verður latið til sjónleikarar. Búnarnir eiga eina heilt serliga rós. Symbolikkurin í búnunum og pallmynd sum heild er kanska ikki altíð til at skilja beinanvegin, men myndin verður livandi.

Leikurin av uppruna messum ein reinur sorgarleikur, og tað verður eisini dúgliga spælt upp á hetta hesaferð. Leikurin leggur mestu orkuna í at lýsa persónarnar og sambondini millum persónarnar, og tað stingur eisini rættiliga djúpt. Uppgerðin við óndskapin og atliti til ein svinnandi moral reika runt á pallinum teir 130 minutturnar, ið leikurin varðar.

Tað er fyri so vítt ikki nøkur serlig traditión fyri at spæla Shakespeare í Føroyum, og áskoðarnir fáa eisini eina serstaka sýning at síggja. Tað skaðar so avgjørt ikki, um tú hevur lisið eitt sindur upp á, áðrenn tú kemur oman í Meiaríið, tí søgugongdin er ógvuliga fløkjaslig fyri ein, ið einki kennir til leikin um Macbeth. Tey ymsu málini gera í fyrstuni ikki annað enn trupult at skilja. Broytingarnar í søgugongdini passa sum heild væl inn, og eina løtu inn í leikin er betri við teimum nógvu tungumálunum, uttan tó at hetta fær topkarakter.

Leikararnir sleppa sum heild væl frá leikinum. Tað krevur nógv av samanspælinum, at spæla ein tílíkan leik, men bólkurin tykist at rigga ógvuliga væl saman. Spælið hjá finnanum, Jonte Ramsten, er framúrskarandi ígjøgnum allan leikin. Samanspælið millum Hans Tórgarð og Katarinu Nolsøe er eisini gott.

Tað er eitt stundum stuttligt og gott spæl við tí gamla leikinum, har nýggjar rútmur og tónar sleppa til sín rætt.

Vit siga sera gott og klappa einaferð enn.

# Menniskjaligi kapitalurin út í bók

**Granskingarverkætlanin fyri økismenning hevur givið út bók, har hugt verður eftir, hvussu føroyski búskapurin aftur kom á føtur. Føroyska samfelagið er eingin fýrakantað mynd, ljóðar tað frá høvundunum**

ÚTGÁVA
*Heri á Rógvi*
*myndir: Finnur Justinussen.*

Meðan kjakið um økismenning enn livir í besta livimáta, er ein nýggj bók um júst sama evnið komin á gøtuna. Granskingarverkætlanin fyri økismenning hevur givið út bókina The Restructuaration of the Faroese Economy. Granskingarverkætlanin hevur í góð tvey ár húsast í Klaksvík, og hetta er eitt úrslitið av arbeiðinum. Frammanundan hesari útgávuni, hevur verkætlanin givið út tíðarrit, eins og annað eisini er gjørt.

Í hesari nýggju bókini verður, eins og heitið eisini sigur, hugt nærri at, hvussu føroyski búskapurin kom aftur á føtur eftir sváru búskaparligu kreppuna, fyrst í hálvfemsunum.

Bókin er skrivað á enskum og hon vendir sær serliga til fakfólk innan samfelagsvísindina, ljóðar tað frá Gesti Hovgaard, ið er ein av oddamonnunum aftanfyri verkætlanina og bókina.

Við góðum hegni til enskt, so ber tað til at fáa nógv burturúr bókini. Tann einstaku kapitlarnir eru skrivaðir soleiðis, at teir kunnu lesast hvør sær.

Bókin nýtir fyri tað nógva sokallað casestudies, har hugt verður eftir ymsum pørtum av Føroyum. Serliga Suðuroyggin fekk umrøðu á tíðindafundi, ið varð hildin mánamorgunin í sambandi við útgávuna.

– Vit vilja eisini við hesari bókini avvísa nógvar av teimum mytum, sum eru um tað føroyska samfelagið. Vit hava lært við okkara kanningum, at tað føroyska samfelagið er ógvuliga egin og fjøllbroyt. Tað ber ikki til at gera eina einfalda svart/hvíta mynd, siga Gestur Hovgaard og Ólavur Waag Høgnesen, sum teljast millum høvundarnar av bókini.

Bókin er ógvuliga samfelagsvísindalig við serligum atliti at sosiologiini. Á tíðindafundinum greiddu teir frá, at teir hugdu serliga at tí sosiala og mentunarliga, ið ger seg galdandi í einum samfelag. Víst verður m.a. í bókini á tann týdning, ið tann menniskjaligi kapitalurin hevur at siga. Hesin hevur verið ein virkandi og stórur faktorur í tí, at føroyska samfelagið hevur reist seg.



*Gestur Hovgaard greiðir frá*

ítróttur
Nr. 34 • týsdagur • 19. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Gera Tórsvøll lidnan

**Nevndin hjá FSF hevur til aðalfundin lagt uppskot fram um liðugtgerð av húsinum við Tórsvøll. Samlaði kostnaðurin verður mettur til knappar 17 milliónir**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast føroyingar nú í tveimum undankappingum hava leikt nakrar av landsdystum sínum á Tórsvølli, so restar enn nógv í, áðrenn vøllurin kann fáa eina endaliga altjóða góðkenning.

Í løtuni er talan um eina fyribils góðkenning frá UEFA, og er hendan latin, treytað av at arbeiðið við liðugtgerðini av vøllinum heldur fram. Nakað sum fráfarandi formaðurin í FSF, Torleif Sigurðsson, hevur lagt stóran dent á í orðaskiftinum, sum hevur verið seinastu tíðina.

Á seinasta aðalfundi samtykti aðalfundurin hjá FSF, at sambandið skuldi fáa heimild at inniloka bygningin, og er hetta arbeiðið gjørt í 2001. Tann parturin av arbeiðinum kostaði áleið hálva trijðu millión, soleiðis at samlaða íløgan hjá FSF í løtuni er 6,5 mió.kr. Framman undan hevði FSF nevnliga nýtt 4 mió.kr. til fundamentir, gólv, loft og útveggir.

Í ætlaðu samtyktini liggur eisini, at FSF skal keypa bygningin við Tórsvøll. Tað er nevnliga so í løtuni, at hóast 6,5 mió.kr eru nýttar, so er tað framvegis Tórsvallargrunnurin, sum er eigari av bygninginum. Fyri at FSF kann fáa neyðuga stuðulin frá FIFA og UEFA til ætlanina, er neyðugt, at formligu ognarviðurskiftini koma í rættlag, soleiðis at tað er Fótbóltssambandið sjálvt, sum er eigari av bygninginum.

Hetta merkir eisini, at tað illa ber til hjá nevndini í FSF at gera annað enn at samtykkja uppskotið. Í øllum førum í longdini. Sum er, hevur FSF goldið 5,15 mió kr., men framvegis er tað grunnurin Tórsvøllur, sum stendur sum eigari av bygninginum. Tað er illa hugsandi, at seinastu góðu 10 milliónirnar kunnu fíggjast uttan stuðul frá bæði FIFA og UEFA, og treytin fyri at veita hendan stuðul er altso, at tað er FSF, sum stendur sum eigari av bygninginum.

### Tyngsti parturin eftir

Tað, sum nú restar í at gera, er øll liðugtgerðin av bygninginum innanveggja. Skiftirúm til leikarar og dómarar skulu gerast í niðastu hæddini, eins og neyðturvuligar umstøður til læknar, fysioterapeutar o.l. skulu gerast. Fótbóltssambandi sjálvt skal eisini hava egin skrivstovuhøli í bygninginum, um UEFA og FIFA skulu lata stuðul, og enn er einki gjørt viðvíkjandi innrættan av hesum, og so skulu fjølmiðararnir og sonevndur VIP'ararnir eisini hava sítt.

Til samans er talan um eina íløgu, sum eftir kostnaðarmetingini, ið verður løgd fyri aðalfundin, upp á 10,4 mió.kr., har av gott og væl ein millión skal nýtast til innbúgv og skrivstovuútbúna.

### Fíggingin

Alt hetta ljóðar sum ein íløga av teimum heilt stóru, og tað er tað sum so kanska eisini.

Tað skal tó leggjast afturat, at tað so langt ífrá er soleiðis, at Fótbóltssambandið sjálvt skal bera kostnaðin av allari verkætlanini. FIFA og UEFA lata íalt nærum 7 mió.kr. í stuðuli til byggingina. Føroya Landsstýrið skal sambært kostnaðarmetingini rinda 1,35 mió. kr. meðan restin, 7,3 mió. kr. so verður fíggjað av Fótbóltssambandinum. Sum er hevur FSF fíggjað 3,1 mió. kr. yvir raksturin hjá felagsskapinum, meðan 2 mió.kr. eru læntar frá UEFA. Roknað verður við, at neyðugt verður við lántøku til at fíggja seinastu 2,2 milliónirnar, og sum skilst hevur FSF sent fyrispurning hesum viðvíkjandi til fíggingarstovnar.

## Fakta um Tórsvøll

**Hvat er nýtt, hvat er ætlanin at nýta og hvussu verður liðugtgerðin av bygninginum við Tórsvøll fíggjað:**

FSF hevur higartil nýtt:

| | |
|---|---|
| Veitt lán til fundamentirútvigg, v.m | 4.000.000 |
| Liðugtgerð av bygningi, uttan | 2.182.112 |
| Nýtt higartil | 6.182.112 |
| Ætlað uppskot til samtyktar: | |
| Liðugtgerð av bygningi | 8.987.112 |
| Innbúgv v.m. | 770.000 |
| teldu- & skrivstovuútbúnaður | 650.000 |
| At nýta til liðugtgerð | 10.407.112 |
| Fígging: | |
| Stuðul frá FIFA | 6.225.000 |
| Stuðul frá UEFA | 650.000 |
| Stuðul frá Føroya Landsstýri | 2.700.000 |
| Lán frá UEFA | 2.009.720 |
| Eginfígging | 3.100.026 |
| Neyðug lántøka | 2.182.112 |
| | 16.866.858 |




Statoil Føroyar
søkir eftir rakstrarleiðara

**Til rakstrardeild okkara søkja vit eftir leiðara**

**Starvið**
Starvið umfatar handfaring av oljuúrdráttum, tað verið seg móttøku, goymslu og víðari flutning til brúkaran. Eisini umfatar starvið menning av deildini, soleiðis at brúkarin fær bestu tænastu skipaða eftir dagførdum mannagongdum.

**Høvuðsuppgávur**
- At skipa flutningin av oljuúrdráttum til viðskiftafólk okkara.
- At verða dagligur leiðari hjá starvsfólkum okkara á rakstrardeildini.
- At leggja til rættis innkeyp av oljuúrdráttum herundir avgreiðslu av tangaskipum.
- At samskipa arbeiðið á goymslum okkara.
- At gera mánaðaruppgerðir á goymslum okkara.
- At hava ábyrgdina av útreiðsluætlanum hjá rakstrardeildini.
- At hava ábyrgdina av, at allar ásettar rakstrar-, trygdar- og umhvørvisskipanir verða fylgdar.
- At útbúgva starvsfólk og menna verandi skipanir.

**Vit bjóða**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði við góðum møguleikum fyri persónligari menning. Møguleikar eru eisini at dagføra royndir á rakstrarstøðum hjá Statoil uttanfyri Føroyar og at luttaka á skeiðum innan samtakið.

**Førleiki**
Nýggi rakstrarleiðarin skal verða ágrýtin, framtakshugaður og duga væl at samstarva við viðskiftafólk og starvsfelagar.
Royndir sum leiðari, at nýta teldu og at handfara oljuúrdráttir geva fyrimun.

**Setanarviðurskiftir**
Rakstrarleiðarin hevur beinleiðis tilvísing til leiðslu felagsins.

Lønin verður sett eftir útbúgving og royndum.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

**P/f Statoil Føroyar**
**att. Niels Juel Nattestad,**
**Postboks 3098, Viðarnes,**
**FO-110 Tórshavn, innan 8. mars.**

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Endamálið hjá Statoil Føroyar er at veita brúkarum kring landið oljuúrdráttir og aðrar vørur. Fyri Statoil Føroyar arbeiða uml. 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og bestu tænastu.
Umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av okkara fremstu málum.

STATOIL
- fyri viðskiftafólk okkara

petur & petur • +298 320870